## Full ferð á

Tað gongur strúkandi í bretska búskapinum. Bruttotjóðarframleiðslan vaks 2,5 prosent í fjør, og hetta er tann størsti vøksturin seinastu fýra árini.

Bretar hava fingið meiri pengar at keypa fyri. Tað sást eisini nú stutt undan ársskiftinum, tá fólk keyptu bilar sum ongantíð fyrr, og tað tulka eygleiðarar sum eitt tekin um, at bretar hava álit á, at tað fer eisini at ganga væl í komandi tíð. Samstundis siga serfrøðingar við BBC, at bretar mugu rokna við rentuhækking í næstum. Seinast hækkaði rentan 0,25 prosentstig í november í fjør, og hon er nú 3,75 prosent. Í ES-londunum, sum hava sett evruna í gildi, er rentan tvey prosent, men Bretland er sum kunnugt ikki evruland.

Tey nýggju tølini, sum vórðu kunngjørd um vikuskiftið, komu alt fyri eitt bretska pundinum til góðar. Virðið vaks eitt sindur, men tað er ikki bara til tað góða, tí hækkar pundið ov nógv, fáa útflutningsfyritøkurnar trupulleikar.

## Eiga at banna telefonsølu

Danska búkararáðið mælir nú myndugleikunum til at banna fyritøkum og feløgum at selja vørur við dyrnar hjá fólki og at selja vørur ígjøgnum telefonina.

Sambært galdandi reglum er tað loyvt at selja tryggingar, bløð, bøkur og limaskap í bjargingarfelagnum Falck við dyrnar hjá fólki ella ígjøgnum telefonina. Brúkararáðið heldur hesa mannagongdina vera ágangandi og mælir til politikarunum til at broyta verandi lóg. Ráðið vísir eisini á, at tað er eingin meining í at hava hesi fýra undantøkini í lógini og hevur tí skotið upp at strika tey.

Felagsskapurin hjá donsku dagbløðunum hevur longu mótmælt áheitanini hjá brúkararáðnum. Lars Henrik Munch, sum er stjóri í JP/Politikens Hus, sigur við Jyllandspostin, at tað verður ein dyggur smeitur fyri dagbløðini, sleppa tey ikki at nýta telefonina fyri at útvega sær nýggjar haldarar.

## Nógv skip hildin aftur

Ikki færri enn 53 norsk skip vórðu hildin aftur í útlendskum havnum í fjør, tí trygdarviðurskiftini ella onnur viðurskifti vóru ikki í lagi, skrivar Aftenposten. Í 2002 vórðu 35 norsk skip hildin aftur uttanlands.

Kurt Kristiansen í norska sjóferðslustýrinum sigur við blaðið, at tað er heilt óneyðugt, at norsk skip verða hildin aftur í øðrum londum. Hann sigur, at reiðaríini eiga at vera meiri ansin, og at tey kunnu ikki loyva sær at slaka við trygdini ella at útseta útbúgvingar hjá manningini fyri at spara pengar.

Tað er heldur ikki bara í útlendskum havnum, at norsk skip verða hildin aftur. Kurt Kristiansen sigur, at av teimum 562 norsku skipunum, sum vórðu kannað í norskum havnum í fjør, vórðu 153 hildin aftur. Í 19 førum vísti tað seg, at skipini høvdu størri last, enn tey høvdu loyvi til. Í øðrum førum vóru skipini ov illa hildin, og summi vóru so illa rustað, at tey sluppu ikki at sigla, sigur hann.

## Hóttir við uppreistri

Ein fyrrverandi generalur í herinum í Venezuela hóttir nú við, at herurin kann fara at gera uppreistur ímóti forsetanum, Hugo Chavez.

Nestor Gonzales var generalur í venesuelska herinum, men varð koyrdur frá í oktober í 2002, tí hann sýtti fyri at gera eftir boðum frá forsetanum. Hann tekur av heilum huga undir við kravinum um eina fólkaatkvøðu um framtíð forsetans. Sjálvur við Hugo Chavez ikki hava fólkaatkvøðuna, og hann hevur sagt, at óheftir útlendskir eygleiðarar sleppa ikki at fylgja við øllum.

Hetta góðtekur Nestor Gonzales ikki, og hann sigur

# Alt fleiri børn verða nýtt sum hermenn



*Hesin drongurin í Kongo er eitt av teimum nógvu børnunum, sum verða nýtt sum hermenn í borgarakrígnum har*

**Ein nýggj frágreiðing gevur eina ræðandi mynd av, hvussu børn verða nýtt og misnýtt sum hermenn um allan heimin. Serliga í Afriku verða børn í túsundatali drigin upp í kríggj og ósemjur**

BARNAHERMENN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er serliga har suðuri í Sudan, har eysturi í Kongo og har norðuri í Uganda, at børn verða misnýtt sum hermenn.

Ringast stendur til har norðuri í Uganda, har børn eru at kalla dagligt álopsmál. Frágreiðingin »Child Soldier Use 2003« sigur, at síðani borgarakríggið í Sudan byrjaði fyri seytjan árum síaðni, hevur uppreistrarherurin Lord Resistance Army burturflutt fleiri túsund børn og síðani nýtt tey sum hermenn. Hildið verður, at eini 5.000 børn verða rænd á hvørjum ári og síðani nýtt sum hermenn, flutningsfólk og kynsligir trælir. Sambært frágreiðingini hevur støðan ongantíð verið so ring sum júst nú.

Sambært ugandiska herinum hevur tað eydnast at fría meiri enn 7.000 tílík børn. Samstundis verður upplýst, at hvørja nátt fara eini 30.000 børn frá húsi og heimi fyri at fjala seg. Tey tora ikki at vera við hús um náttina, tí tað er tá, uppreistrarherurin rænir børnini.

Sambært »Child Soldier Use 2003« er tað ikki bara Lord Resistance Army, sum nýtir børn sum hermenn. Sagt verður, at ein annar uppreistrarherur, SPLA, hevur minst 7.000 børn ímillum sínar hermenn.

Men tað eru ikki bara uppreistrarbólkar, sum nýta børn sum hermenn. Barnahjálpargrunnurin hjá ST vil vera við, at tann almenni herurin í Kongo hevur minst 8.000 børrn, og sagt verður, at í summum herdeildum er meiri enn helmingurin av hermonnunum børn.

Skilið er tað sama nógva aðrastaðni í Afriku. Á Fílabeinsstrondini eru nógv børn um tíggju ára aldur hermenn, og í Burundi eru umleið 14.000 børn, sum taka lut í borgarakríggnum har.

### Ikka bara í Afriku

Tað er heldur ikki bara í Afriku, at børn verða nýtt sum hermenn. »Child Soldier Use 2003« sigur, at millum 35 og 40 prosent av stjórnarherinum í Burma eru børn, og at fleiri teirra eru yngri enn ellivu ár. Eisini uppreistrarbólkarnir í Burma nýta børn sum hermenn, stendur í frágreiðingini.

Á Filipsoyggjunum fáa børn hernaðarvenjing, so tey kunnu hjálpa teimum muslimsku uppreistrarfelagsskapunum, og í Sri lanka nýttir uppreistrarfelagsskapurin LTTE eisini børn í bardaganum ímóti stjórnarherinum.

Í Kolombia hevur uppreistrarfelagsskapurin FARC umleið 11.000 børn í sínum deildum. Dreingirvir taka lut í baraøgum við stjórnarherin, og genturnar verða noyddar at virka sum skøkjur hjá hermonnunum, stendur í frágreiðingini.

# Kerry frammanfyri

**John Kerry hevur bestu møguleikarnar at vinna annað demokratiska uppstillingarvalið, sum er í New Hampshire í morgin**

Hóast bæði John Edwards og Wesley Clark hava havt veksandi undirtøku í New Hampshire teir seinastu dagarnar, bendir alt á, at John Kerry fer at vinna uppstillingarvalið hjá Hampshire hava fyrr vent øllum á høvdið. Fyri fýra árum síðani valdu teir republikansku veljararnir har John McCain og ikki George W. Bush, og fýra ár frammanundan valdu teir kenda senatorin Edward Kennedy at hjálpa sær í New Hampshire. Eygleiðarar siga, at júst stuðul hansara hevði stóran týdning fyri tað fyrra úrslitið. Um Kennedy eisini kann

# ítróttur

Nr. 17 • týsdagur • 27. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
ÍF-Dráttur 2-3 (22-25, 17-25, 26-24, 25-22, 8-15)
Fleyr-TB 0-3 (11-25, 18-25, 14-25)
Mjølnir-KÍF 3-0 (25-16, 25-17, 25-21)

**Meistaradeild menn**
ÍF-SÍ 3-1 (25-21, 25-20, 23-25, 25-21)
Mjølnir-Fram 3-0

# TB framvegis á odda hjá kvinnum

**Tríggir dystir í meistaradeildini hjá kvinnum, vóru leiktir um vikuskiftið. Sum úrslitini lagaðu seg er Dráttur av álvara farið at blanda seg í oddinum**

FLOGBÓLTUR
*Hermann Mortensen*



*Mjølnir-kvinnurnar hava ikki ráð at missa eitt tað einasta settið, sum støðan er, og sunnudagin greiddu tær sín setning, tá KÍF vitjaði*
*Mynd: SáH*

Fríggjakvøldið hevði verandi meistararnir úr ÍF vitjan av Drátti. Í endaspælinum hevur tað gingið væl hjá Drátti og fyri tveimum vikum síðan vann liðið Mjølnir-kappingina og tryggjaði sær harvið sætið í steypafinaluni. Verandi meistararnir hava ikki somu styrki sum í fjør og tað hevur ikki gingi eftir vild hjá ÍF. Tað stóð eitt triðja pláss uppá spæl fríggjakvøldið og harvið kundi vinnandi liðið eisini verða við til at mynda toppin í meistaradeildini.

Sjálvur dysturin var sera spennandi og sigurin kundi fari báðar vegir, men tað vóru tær úr Drátti, ið drógu longra stráðið. Dráttur vann 3-2.

Fyrsta sett var javnt, liðini skiftust um at hava leiðsluna, men Dráttur vann at enda settið 25-22. Í øðrum settið vóru tær úr Drátti klárt omaná og tær vunnu eisini annað sett 25-17. Triðja sett var ein sannur gysari, sum endaði 26-24 til ÍF. Fjórða sett var eisini javnt og her vísti ÍF góðan moral og tær vunnu at enda 25-22. Síðan var farið út í eitt fimta og avgerandi sett. Her vóru tær úr Drátti meira avgjørdar og tær vunnu fimta sett 15-8 og harvið dystin 3-2.

Við sigrinum er Dráttur á triðja plássi við átta stigum og einasta veruliga hóttan fyri TB og Mjølnir, sum hava verið suverenar higartil í kappingini. Fyri ÍF kom tapið sera illa við, nú er munurin upp til oddaliðið TB seks stig og tað verður meira enn trupult at innheinta aftur.

Botnliðið Fleyr hevði vitjan av oddaliðinum TB. Hetta vísti seg at verða ein avgreiðslu spurningur fyri TB. TB vann sannførandi 3-0 útisigur við settúrslitunum 25-11 25-18 og 25-14. Við sigrinum er TB framvegis á odda í meistaradeildini hjá kvinnum.

Í KÍ-høllini spældu Mjølnir og KÍF. KÍF kundi einki stilla upp ímóti Mjølni, sum vann tryggan 3-0 við settúrslitunum 25-16 25-17 og 25-21.

Støðan í meistaradeildini hjá kvinnum er nú tann, at TB er á odda við 12 stigum, Mjølnir hevur 10 stig og Dráttur hevur 8 stig. Síðan koma ÍF við 6 stigum, KÍF við 5 stigum og niðast er Fleyr við 1 stigi.

# Eitt mál millum ÍF og Mjølnir

**Sørvingar fingu durafjórðingin frá ÍF, tá teir sunnudagin máttu fara heim aftur við 3-1 tapi**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

So er tað ein staðfesting, at gullstríðið í mansflogbólti fer at standa millum ÍF og Mjølnir. Leingi hevur SÍ annars nálgast uppi í teimum báðum oddafiskunum men eftir úrslitini um vikuskiftið má tað standa mest sum greitt, at teirra leiklutur í hesum er av á hesum sinni.

Møguleikin hevði framvegis verið til staðar, um sørvingar høvdu fingið stig burtur úr dystinum á Kambsdali sunnudagin, har ÍF tó varð mett sum favorittur. Eitt heiti, sum fuglfirðingarnir eisini livdu upp til. Tó at talan var um hampuliga jøvn sett, so tóktist alt ganga heimaliðnum til vildar tey bæði fyrstu settini, men tá SÍ so tók sær av triðja settinum, kom spenningurin aftur í dystin.Tað eydnaðist tó ikki sørvingunum at halda fast, og við sigrinum opnaðu fuglfirðingarnir eitt glopp upp á fimm stig niður til SÍ, og tað kann væl vísa seg at gerast meira enn tungt hjá sørvingunum at taka aftur.

Í hinum dystinum hetta vikuskiftið gjørdi Mjølnir bart, tá Fram var á vitjan. Tað varð ikki roknað við, at Fram fór at gera stórvegis við Mjølnir, og tað megnaðu teir sum so heldur ikki.

### Brak í Klaksvík

Við hesum er lagt upp til eitt satt brak, tá Mjølnir komandi sunnudag tekur ímóti ÍF. Ein dystur, sum verður ein endurtøka av finaludystinum í Mjølnir-kappingini fyri tveimum vikum síðani, tá ÍF tryggjaði sær pláss í steypafinaluni.

Ta ferðina varð talan um ein sannan gysara, sum gekk yvir øll fimm settini, og tað kann so væl og virðiliga henda seg, at talan verður um eina endurtøku hesaferð. Í øllum førum tykjast dygdirnar hjá liðunum báðum í mangar mátar at viga upp móti hvørjari aðrari, so tað verða allar helst teir minstu av teimum smáu marginalunum, sum verða á muni í dystinum, sum allar helst fer at viga heilt tungt, tá gullmerkini fyri kappingarárið skulu hangast um hálsin.



*Mjølnir hevði ikki stórvegis trupulleikar av Fram, og nú bíða klaksvíkingar spentir til oddabrakið komandi vikuskifti*
*Mynd: SáH*